# Ólógligt at gera SEV til partafelag

*– Umboðsnevndini er evsta vald í SEV og tí kunnu kommunurnar onki gera av sínum eintingum, sigur Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsnevndini*

ÁKI BERTHOLDSEN



– Kommunurnar kunnu ikki av sínum eintingum gera SEV til eitt partafelag.

– Tað hevði rætt og slætt verið ólógligt.

Tað sigur formaðurin í umboðsnevndini hjá SEV, Hans Tausen Olsen.

Hann sigur, at reglugerðin hjá SEV heilt einfalt forðar fyri, at kommunurnar fáa blandað seg uppí viðurskiftini hjá SEV.

– Tað eru ikki kommunurnar, sum stýra SEV. Tað er ein umboðsnevnd, sum kommunurnar velja, sum stýra SEV.

– Og í SEV er tað hendan umboðsnevndin, sum hevur evsta myndugleikan og tað fáa kommunurnar onki gjørt við, sigur hann.

Hann sigur, at SEV er eitt lutafelag, og skal SEV umskipast, er tað ein sera truppul mannagongd.

Hann vísir m.a. til grein 11 og grein 14 í lógunum fyri SEV.

– Í Grein 11 stendur, at skal Lutafelagið SEV takast av, skulu 2/3 av umboðsmevndini atkvøða fyri tí.

– Og aftaná skal landsstýrið góðkenna avgerðina.

– Og í grein 14 stendur, at skal ein kommuna taka seg úr SEV, skal tað góðkennast av øllum hinum kommununum.

– Tí fáa kommunurnar ikki rørt SEV, uttanum umboðsnevndina.

Formaðurin í umboðsnevndini heldur, at orsøkin til, at tað bleiv gjørt so truppult at røra felagsskapin, er, at tá ið SEV varð stovnað, var eitt slíkt ódnartak, sum sjálvdan sæð fyrr her á landi og stovnararnir vildu fyri alt í verðini byrgja fyri, at tað datt niðurfyri aftur.

Hans Tausen Olsen sigur, at tí kunnu kommunurnar kanna, hvat tær velja. Tær fáa onki gjørt við málið kortini.

– At royna broyta SEV, er at leggja seg út í viðurskifti, sum við lóg eru latin upp í hendurnar á umboðsnevndini at umsita.

**Sera demokratiskt**

Júst hesi viðurskifti hava mangan fingið fólk at skýrt SEV ein ódemokratiskan felagsskap, og tað eru mong, sum hava ilskast inn á, at kommunurnar hava so lítið at siga í SEV, hóast tað skal eitast, at tær eiga felagsskapin.

Hesum er Hans Tausen Olsen als ikki samdur í. Tvørturímóti heldur hann, at SEV er ein so demokratiskur felagsskapur, sum hugsast kann.

– Kommunurnar hava rætt til at velja limir í umboðsnevndina. Men tá ið umboðsnevndin er vald, hevur hon evsta myndugleika, uttan at nakar kann blanda seg uppí.

– Hesin rætturin hjá øllum kommununum at velja limir í umboðsnevndina, tryggjar hvørji einstakari kommunum, at eisini teirra viðurskifti verða borin fram í SEV.

– Tí er umboðsnevndin eisini trygdin fyri, at allar Føroyar sum tær eru, verða umboðaðar í SEV, sigur Hans Tausen Olsen.

Hann sigur, at halda fólk, at umboðsnevndin er ov stór og tung at arbeiða við, ber tað til at minka hana.

– Annars fer tað at koma av sær sjálvum, nú kommunur skulu leggja saman, so at tað ikki verða meiri enn einar 8-10 kommunur í Føroyum.

# Brúkarin verður tann stóri taparin

*– Verður SEV gjørt til partafelag, fer alt el-kervið í lepar, ella má prísurin á streymi hækkast munandi, sigur formaðurin í umboðsnevndini hjá SEV*



*Næstu 10 árini má SEV leyðsliga mett gera íløgur fyri einar 500 milliónir fyri at tryggja føroyska samfelagnum álítandi streymveiting. Verður SEV gjørt til partafelag, kunnu vit gloyma alt um tað, sigur Hans Tausen Olsen*

ÁKI BERTHOLDSEN

Hevði SEV verið eitt partafelag, hevði brúkarin undir øllum umstøðum verið tann stóri taparin.

Tað er Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsnevndini hjá SEV, púra sannførdur um.

Hann sigur, at tað stutta av tí langa, at hevði SEV verið eitt partafelag, hevði tað verið neyðugt at hækka prísin á streymi heilt munandi, um elveitingin skuldi verðið varðveitt á tí støði, hon er á nú, ella helst blivið enn tryggari.

Og tað hevði komið bæði privatum húsarhaldum, og ikki minst vinnulivinum, illa við, tí flestøll halda, at prísurin á streymi er longu ivaleysa høgur sum er.

Men mest sannlíkt heldur hann, tað hevði verið, at varð SEV partafelag, høvdu allar útbyggingar blivið steðgaðar, ella í øllum førum høvdu tær verið toygdar nógv longri, enn SEV nú ætlar.

–Samstundis hevði viðlíkahaldið blivið munandi skert.

–Í øllum førum hevði brúkarin blivið tann stóri taparin.

**Stórar eykaútreiðslur**

Hans Tausen Olsen sigur, at orsøkin til hesar metingar er, at varð SEV eitt partafelag, hevði tað fingið stórar eykaútreiðslur at drigist við, sum tað ikki hevur nú.

– Eitt nú hevði tað verið noytt at goldið partafelagsskatt.

– Men skal SEV gerast eitt partafelag, má onkur keypa partbrøvini. Og tað ger ongin, uttan at partabrøvini geva avkast. Tí fara partaeigararnir sjálvsagt at krevja vinningsbýtið av sínum partabrøvum.

Formaðurin í umboðsnevndini sigur, at einasti máti at fáa ráð til hesar eykaútreiðslur, er at steðga við útbyggingum og at minka um viðlíkahaldið, ella at seta streymin munandi upp.

Hann sigur, at royndir aðrastaðni vísa, at har streymveitingin er á privatum hondum, verður hildið aftur við útbyggingum og viðlíkahaldið verður minkað munandi. Sostatt forfellur øll elveitingin, og nógva staðni hongur hon í lepum fyri at kunna halda prísin á streymi niðri á einum góðtakiligum støði.

Hans Tausen Olsen sigur, at slíkt ber til aðrastaðni, tí har hava tey altíð fleiri møguleikar at fáa streym frá, tí har eru fleiri streymveitarar.

– Um t.d. hvørt einasta elverk í Danmark gekk fyri, hevði ongin vandi verið á ferð, tí so hevði altíð borið til at fingið streym úr onkrum av grannalondunum.

–Tann møguleikan hava vit ikki í Føroyum. Tí er okkara einasti møguleiki at varðveita eina trygga streymveiting, og at hækka støðið enn meiri, at byggja út og at gera nógv burturúr viðlíkahaldinum.

Hans Tausen Olsen sigur, at heilt leyðsliga mett, skal SEV gera íløgur fyri einar 500 milliónir tey næstu 10 árini fyri at tryggja øllum landinum eina álítandi streymveiting.

– Tað er ein íløga, um als ikki kemur uppá tal, um SEV verður eitt partafelag.

Hann sigur, at SEV er ein frálík loysn fyri alt samfelagið, soleiðis sum tað er nú er skipað.

–Tað er ein solidarisk skipan, har SEV hevur skyldu at veita øllum landinum streym fyri sama prís.

– Tað er stóra styrkin hjá SEV, at tað hevur skyldu at veita øllum landinum streym fyri sama prís.

– Tað hava vit onga trygd fyri, blívur verandi so, um SEV verður eitt partafelag.

– Tí hvat hendir um onkur keypur streymveitingina til miðstaðarøkið partafelagnum? Tað fer at fáa álvarsligar avleiðingar fyri útjaðaran í Føroyum, tí so noyðast fólk har at betala munandi meiri fyri streymin, sigur Hans Tausen Olsen.

Hann veit heldur ikki, hvat endamálið hjá kommunum skal vera við at gera SEV til partafelag, tí tað er eitt sera væl rikið felag sum er og tað kann neyvan gerast bíligari.



# Býráðspolitikarar leypa fram av

*Borgarstjórin í Klaksvík heldur, at býráðspolitikarar í Havn og á Tvøroyri lupu fram av, tá teir kravdu fleiri upplýsingar um ætlaninar hjá Kommunusamskipanini viðvíkjandi SEV*

Tað kom øði í grindina, tá Dagur og vika fríggjakvøldið hevði eitt innslag um, at Kommunusamskipanin - tað er felagið hjá stóru kommunum í landinum - var farið at kanna framtíðarmøguleikarnar hjá SEV.

Bæði í Havn og á Tvøroyri vildu býráðslimir hava meira at vita um hesar ætlanir, og eyka býráðsfundir vórðu settir á skránna.

– Hetta er politikkur og journalistikkur, tá hann er minst gjøgnumarbeiddur. Tað eru ongar ætlanir um at broyta SEV, men starvsnevndin í Kommunusamskipanini skal kanna, hvussu kommunurnar og brúkarin í framtíðini fáa sum mest burtur úr felagnum, sigur Jógvan við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík.

**Líkist ongum**

- Hatta var sum at servera ein flúgvandi tallerk, tí tað er einki ítøkiligt í málinum. Býráðsformenninir hava bara biðið starvsnevndina hugt eitt sindur eftir SEV. Tað liggur einki ítøkiligt á borðinum.

Tað eru kommunurnar, sum eiga SEV, og tí heldur borgarstjórin í Klaksvík, at tað er upplagt, at Kommunusamskipanin fer at kanna SEV fyri at vita, hvussu tað fæst sum mest burtur úr felagnum.

– Tað líkist ongum, at býráðsformenninir ikki kunnu biða umsitingina kanna eitt mál, uttan fylgjurnar skulu verða sum tær vóru í Havn og á Tvøroyri, heldur Jógvan við Keldu.



Jógvan við Keldu heldur, at býráðspolitikarar í Havn og á Tvøroyri lupu fram av, tá teir frættu um, at starvsnevndin hjá Kommunusamskipanini skuldi fara at kanna bygnaðin hjá SEV

# Teir sita so eina

*Ein av mest seldu føroysku plátunum nakrantíð kemur nú á fløgu*

EYÐUN KLAKSTEIN

Nú ríða Vestmenn aftur.

Í morgin kemur fløga út við best umtókta føroyska countrybólkinum nakrantíð. Talan er ikki um nýggjar sangir, men hinvegin um ein endurútgávu av plátuni Brot.

Vestmenn góvu sína fyrstu plátu út í 1983, og tað eru sangirnir av hesi plátuni, sum nú verða digitaliseraðir og útgivnir á fløgu. Millum teir kendastu sangirnar, sum eru við á Brot, eru *Eg siti so eina, Ró* og *Mathilda*.

Hesir sangir gjørdu fyrstu plátuna hjá Vestmonnum so væl umtókta, at eini 5000 eintøk av platuni fóru um handilsdiskarnar kring landið. Hetta ger plátuna til eina tað mest seldu í Føroyum nakrantíð.

**Tvey eykaløg**

Á fløguni Brot, sum kemur út í morgin, eru tvey eykaløg við.

Talan er um *Gestur* og stóra hittið, *Leygarkvøld í Havn*, sum eru at finna á útgávuni Kanska ein dag.

Vestmenn eru Ólavur Højgaard, Martin Joensen og Niels Olsen. Men umframt teir spæla eisini Jógvan í Toftum Olsen, Bogi Olsen, Jórun Højgaard, Rúna á Heygum, Ólavur Øster, Johannes á Rógvu Joensen og Milson Zachariasen við á Brot.

Fløgan endurgevur tónleikin sum hann upprunaliga var á plátunum, men kortini uttan skøvur og skursl.

HCW Tórgarð gevur fløguna út og hon verður at fáa kring landið leygardagin.



*Teir sita so eina. Vestmenn eru aftur á hestbaki og ríða út á preriuna í morgin, tá gamli bestseljarin, Brot, kemur á fløgu*

